Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 02.12.25
Mál nr.: 25/27937
Málsviðgjørt: DH

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§5 *Stk. 3.* [2] Á hvørjum ári, seinast 15. juli, ásetir landsstýrisfólkið í kunngerð veiðigjald fyri makrel, sild og svartkjaft, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli árið eftir, samanber tó § 7, stk. 2.	§5 *Stk. 3.* [2] Á hvørjum ári, seinast 15. juli, ásetir landsstýrisfólkið í kunngerð veiðigjald fyri makrel, sild og svartkjaft, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli árið eftir.
§6 *Stk. 2.* Í seinasta lagi 15. desember á hvørjum ári ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð veiðigjald á botnfisk í Barentshavinum, sum skal vera galdandi frá 1. januar til og við 31. desember, samanber tó § 7, stk. 2.	§6 *Stk. 2.* Í seinasta lagi 15. desember á hvørjum ári ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð veiðigjald á botnfisk í Barentshavinum, sum skal vera galdandi frá 1. januar til og við 31. Desember.
§ 7. Fer tøka kvotan, sum er sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska, undir 50% av miðal tøku kvotuni, sum er sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska seinastu 5 árini, lækkar veiðigjaldið, tað árið, kvotan er galdandi, niður í 50% av veiðigjaldinum, útroknað eftir § 9. *Stk. 2.* [1] [2] Tá staðfestast kann at tøka kvotan, sum er sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska eitt ár, er lægri enn mørkini, sum eru ásett í stk. 1, skal landsstýrismaðurin í kunngerð áseta	Ásetingin verður strikað

lækkaða veiðigjaldið sambært stk. 1. Er talan um kvotu av sild, lodnu ella svartkjafti, ásetir landsstýrismaðurin í seinasta lagi 15. juli í kunngerð veiðigjaldið sambært stk. 1, sum skal vera galdandi frá 1. august til og við 31. desember. *Stk. 3.* [2)] Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri makrel.	